Ágangur

# Fundur

Kunnandi fundur verður fyri øllum foreldrum og avvarandi hjá børnum í B36 og annars øllum áhugaðum um átakið

**VIT ERU ÍMÓTI**
**KYNSLIGARI**
**MISNÝTSLU AV BØRNUM**

sum verður í B36-húsinum
mikudagin 12. mars kl. 19:00.

Fólk frá KRIS, løgreglu og Barnabata fara at siga sína hugsan



Ungdómsdeild

agangur.com

KRIS

---

www.dekk.fo

# Fólk til dekkverkstað

**Søkt verður eftir tveimum røskum monnum til fast arbeiði á verkstaði í Havn**

**Vit vænta av tær, at:**
- tú ert fyrikomandi og kundavinarligur
- Ert útbúgvin mekanikari , hettar er ikki eitt krav
- kanst arbeiða sjálvstøðugt - eisini tá harðast leikar á
- ert framsøkin og hugaður at menna virksemið okkara
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði.

**Vit bjóða tær:**
- fast arbeiði
- góða løn
- eitt fjølbroytt arbeiði, har tú kemur víða um í fyritøkuni.

Send okkum nøkur orð um teg sjálvan. Teldupostur: runi@dekk.fo
Ella send okkum eitt bræv: Dekksentrið - Postsmoga 3077- 110 Tórshavn
Meira fæst at vita um starvið á tlf. 216364

DEKK SENTRIÐ

---

# Ein millión

## til at marknaðarføra Føroyar

Bjóðið verðini vælkomnari til Føroya at ferðast. Søkið nú um stuðul og verið við til at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál!

Undanfarin ár eru 1.000.000 kr. settar av til **serlig** marknaðarátøk. Treytað av, at peningur verður játtaður til hetta átak á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2008, vil SamVit bjóða til samstarv um at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál.

Milliónin skal nýtast soleiðis, at føroysk virki/feløg, kunnu søkja um stuðul til verkætlanir eftir »krónu fyri krónu« háttinum. Hetta vil siga, at umsøkjarin letur eins stóra upphædd til verkætlanina, sum SamVit stuðlar við.

### Verkætlanir

Minsti stuðul, ið verður latin einstakari verkætlan, er 50.000 krónur, og mesti stuðul er 250.000 krónur. Ganga fleiri saman um eina verkætlan, kann í serligum føri verða vikið frá hámarkinum, treytað av, at verkætlanin er av slíkari støðd, at stuðul kann verða latin.

Nýskapandi tiltøk hava fyrimun. Verkætlanir, har tvey ella fleiri virkir/feløg ganga saman, hava eisini fyrimun. Verkætlanin skal ikki vera partur av vanligu marknaðarrøktini. Stuðul verður ikki latin til faldarar, uttan so at teir eru beinleiðis knýttir at verkætlanini, ið søkt verður um stuðul til.

Tað ber til at samstarva við sambond uttanlands, men bert tann føroyski parturin í verkætlanini fær stuðul.

Stuðulin verður útgoldin, tá ið verkætlanin er framd í verki.

### Upplýsingar

Í umsóknini skal í øllum førum verða greitt frá:
- endamáli
- kostnaðarætlan
- fíggjarætlan
- tíðarætlan
- samstarvspørtum

### Umsóknarblað

Umsóknir skulu sendast SamVit á serligum umsóknarblaði, ið kann takast niður á www.samvit.fo, og sum annars er at fáa frá SamVit. Meira fæst at vita við at venda sær til Per Hansen á tlf. 30 69 00.

### Umsóknarfreist

Umsóknarfreistin er 10. mars 2008.

SamVit

SamVit · undir Bryggjubakka 12 · Postsmoga 118 · FO-110 Tórshavn
Tlf +298 30 69 00 · Fax +298 30 69 01 · www.samvit.fo

SENDISTOVAN